# Bardust við knívum

**Politiið í Havn letur sum heild væl at vikuskiftinum, sum hevur verið rættiliga friðarligt. Men um hálvgum fýra tíðina sunnunáttina varð løgreglan boðsend, tí nakrir ungir dreingir bardust við knívum í Havn**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Um hálvgum fýra tíðina sunnunáttina varð løgreglan í Havn boðsend, tí nakrir ungir dreingir bardust við knívum.

Vakthavandi á politistøðini í Havn sigur, at ein 17 ára gamal drongur hevði fingið eitt skarð í høvdið, men talan var ikki um nakað álvarsamt. Tveir dreingir eru tiknir fyri bardagan.

Annars letur politiið væl at júst farna vikuskifti. Tað hevur verið rættiliga friðarligt, men nógv full fólk hava verið í býnum. Sagt verður av politistøðini, at tað sæst væl aftur, at fólk hava fingið løn.

Nógvar ófriðarligheitir hava verið hjá løgregluni at fara út til um vikuskiftið, men tó hevur tað ikki verið tað stóra av týdningi.

# Skúrur fór á flog



*Hesin skúrurin fór á flog sunnudagin, og lendi á tveimum bilum uttanfyri bilasøluna hjá Wenzel*

Í vindinum, sum var sunnudagin, fingu tveir bilar á bilasøluni hjá Wenzel í Havn skaða, tá ein skúrur feyk á teir.

Tekniski skúli í Havn leigar høli oman fyri Bilasøluna hjá Wenzel við Velbastaðvegin í Havn. Skúrurin, sum stóð í túninum, fór á flog og feyk um garðin og einar fimm metrar niður, har hann lendi á takinum á tveimum bilum, harav annar var ein nýggjur bilur.

Bilarnir fingu báðir skaðar av óhappinum.

Tað eru næmingar á timburdeildini á Tekniska skúla, ið gera hesar skúrarnar fyri at venja seg at gera ymsar samankomingar í stórviðinum.

# Tríggir mans í ferðsluóhappi

**Leygarkvøldið var eitt ferðsluóhapp millum Skálabotn og Skipanes. Tríggir ungir mans vóru í bilinum, og teir sluppu væl frá óhappinum**

ÓHAPP
*Ingrid Bjarnastein*

Hepni bjargaði trimum ungum dreingjum, sum leygarkvøldið komu út fyri einum ferðsluóhappi á vegastrekkinum millum Skálabotn og Skipanes.

Av politistøðini í Runavík verður gitt, at tað var ov nógv ferð, sum var orsøkin til óhappið.

Tríggir ungir mans, sum vóru á veg úr Havn til Leirvíkar, vóru við í bilinum.

Bilurin koyrdi oman í grúsið niðanfyri vegin, og førarin hevur helst verið ov knappur at snara innaftur, tí bilurin koyrdi beint niðan í bakkan omanfyri vegin. Bilurin fór sendandi 40 metrar ígjøgnum luftina áðrenn hann síðani lendi á øllum fýra hjólunum, og fór sendandi 13 metrar afturat áðrenn hann steðgaði á einum víkiplássi. Bilurin gjørdist vrak.

Teir tríggir ungu menninir vórðu sendir til Havnar til observatión, men onki álvarsamt var hent við teimum. Teir vórðu allir útskrivaðir sunnudagin.

Førarin sat ikki í trygdarbeltið, men tað gjørdu hinir, sum báðir vóru sovnaðir aftur á túrinum norður. Um førarin eisini varð sovnaður, er ikki greitt enn, tí politiið hevur ikki havt møguleika at avhoyra dreingirnar. Blóðroynd er eisini tikin fyri at tryggja, at tað ikki var rúsdrekka, sum var upp á spæl.

## VIÐMERKINGAR

# Tjóðveldisflokkurin og givin lyftir

**Sverre Midjord**



Nú landsstýrismaðurin Høgni Hoydal hevur ætlanir um skúlabygging fyri umleið 400 milliónir, tað er jú tað sama sum samgongan lat dønum, tí at teir sjálvir vildu gjalda fyri skyldur, sum danska stjórnin hevur yvir fyri føroyska samfelagnum. Jú sannast má, at ríkir menn oksar keypa – mangt man um fátækan leypa. Ætlanir eru mangar, men tað kostar pengar, og tað ið Høgni Hoydal sigur, at teir byggja skúlar fyri sum sagt 400 milliónir, so er ikki at gloyma, at pengarnir eru ikki tøkir. Raðfylgju av, hvat og hvar skuldi byggjast og ikki gav tað nakran hvøkk, at Tórshavn stóð í fremstu røð. Tað er greitt, at oddafiskar búgva har. Tey, sum búgva uttan fyri miðstaðarøkið, tað eru bara fiskimenn, teir, sum ikki tøma men bera til føroyska samfelagið. Raðfylgjan er sett, og ætlanir eru helst komnar á borðið, men sum eg eisini havi sagt við Høgna Hoydal, føroyska samfelagið livir ikki av teldum og øðrum tøkni, onkur skal gjalda, og teir eru gloymdir ella í øllum føri ikki fremstir í raðfylgjuni hjá verandi samgongu. Uttan okkara útróður og okkara fiskimenn vildu allir kassar verið tómir og pengar skula til. Teir fáast ikki við at trýsta á nakrar telduknappar. Sjálvandi skulu vit hava skúlar, men raðfylgjur mugu vera eftir inntøkuni og ikki er rætt at binda komandi samgongur, soleiðis sum tað verður gjørt. Tað er rætt, at okkara ungdómur fær góðar umstøður, ongin ivi er um tað. Men tann dag, tá ið allir ungdómurin situr við teldurnar, tá kemur lítil fiskur á land, tí uttan mun hvat gjørt verður, so eru Føroyar ein fiskitjóð, og tað er tann vinnan, sum skal bera allan tann føroyska búskapin. Tað er gloymt av verandi samgongu.

Eitt annað sum Tjóðveldisflokkurin hevur gloymt, tey givnu lyfti um hin partin av samfelag okkara. Tey, sum hava tænt sína verndarskyldu, men nú slitin og gomul – hvat við teimum? Tað kann ikki sigast Tvøroyri er ovalaga á byggiskrá hjá verandi samgongu og sigast má, at Tjóðveldisflokkurin heilt hevur gloymt givin lyfti yvir fyri teimum, ið borið hava samfelagnum uppi.

Men bert fyri at minna samgonguna og sanniliga Tjóðveldisflokkin á givnu lyfti, fyri nú nógvum árum síðan, meðan Tjóðveldið hevði meiriluta í Tvøroyrar Býráð og harvið borgarstjóran, varð lagdur ein skúli á Tvøroyri. Hesin skuldi útbúgva fólk til heimarøktina. Fólk til at taka sær av teimum eldru, ið vildu búgva í egnum heimi sum longst.

Tað var Torbjørn Jacobsen, ið við stríð og strev fekk lagt hesa ætlan á Tvøroyri.

Fyri at fáa eina byrjan, so gjørdi Tvøroyrar kommuna hølir klár til eina fyribils loysn, tí tilsøgn varð givin um at byggjast skuldi. Tvøroyrar kommuna hevði og hevur øki tøkt til endamálið. Fyribils tiltakið kostaði nógvar pengar, ið allir eru goldnir av borgarum á Tvøroyri – eisini tjóðveldisfólki. Hetta tiltak hevur ongan studning fingið. Vit hava bíðað í tolni, men nú er tolið uppi. Borgarar á Tvøroyri vilja hava eitt greitt svar frá tær Høgni Hoydal, nær verða pengar settir av til byggjan av hesum skúla?

Tað er væl ikki so at hesin skúlin, sum skal útbúgva fólk til at taka sær av gomlum og sjúkum, sum helst vilja vera í heimi sínum á ellisárum, ein samgonga sum sigur seg byggja á tey kristnu lívsvirðini, heilt hevur gloymt tey givnu lyfti, tað er vónandi ikki so at hetta málið er lagt í niðastu skuffu í Tinganesi.

# Føroyskur barna-og ungdómsfilmur

TÍÐINDASKRIV

Um alt gongur sum fólkini aftanfyri Trølla Pætur filmarnar vænta og vóna, so verður ein stórur barna- og ungdómsfilmur framleiddur í Føroyum, um ikki so heilt langa tíð. Í gott 2 ár, hava skrivandi kreftir í Klaksvík, saman við øðrum góðum fólkum, haft samband við filmsfeløgini Zentropa og Nordisk Film í Danmark. Søgan er skrivað og 24. mai, senda hesi feløg tveir danskar filmsrithøvðundar til Føroya, at skriva eitt fyrilbils manuskript, sum skal leggjast fyri DFI (Dansk Filmsinstitut) í juli.

Fólkini aftanfyri Trølla Pætur filmarnar, eru sera spent uppá hvat DFI sigur. Hetta hevur verið ein langur og drúgvur róður, men nú síggja vit ljós fyri endanum á tunnilinum. Um DFI góðtekur manuskriptið, so verður farið undir at framleiða fyrsta føroyska barna og ungdómfilm nakrantíð og tað gleða vit okkum til, siga teir til endans stuttum tíðindaskrivi.

Longu nú hevur hetta projekt kostað fyrireikarnum nógva tíð og pening. Fyrireikarnir siga, at uttan stuðul og hjálpsemi frá Føroya Banka og uttan góðvilja frá Atlantic Airways, hevði henda verkætlan ongantíð komið so langt, sum hon nú er komin.



## UTTAN ÚR HEIMI

# SARS-virusið meiri seiglívað enn higartil hildið

**Nýggjar kanningar hjá heimsheilsustovninum WHO vísa, at SAES-virusið eru munandi meiri seiglívað, enn granskarar higartil hava hildið.**

SARS-SJÚKAN
*Árni Joensen*



*SARS-virusið vísir seg nú at vera munandi meiri seiglívað, enn granskarar higartil hava hildið, og at sjúkan eisini smittar uttan beinleiðis samband millum fólk*

Tær nýggju kanningarnar hjá WHO vísa, at SARS-virusið er virkið í bæði dagar og vikur uttan á sjálvum smittuberanum. Tað merkir, at sjúkan smittar ikki einans við beinleiðis sambandi millum smittuberan og annað fólk, men at tað kann vera nóg mikið at nema við ein lut, sum tann smittaði hevur havt uppi á sær ella nomið við. Enn vita granskararnir ikki, hvussu nógv virus fólk tola, áðrenn tey gerast sjúk.

Granskararnir hjá WHO halda, at virusið kann sita virkið í fleiri tímar uttan á eitt nú einum luti. Tað kann liva heilt upp í fýra samdøgur í skarninum hjá einum smittaðum, og í einum køliskápi er tað virkið í minst tríggjar vikur, vísa kanningarnar.

Kanningarnar vísa samstundis, at SARS-virusið tolir ikki nógvan hita, og at tað doyr, tá hitin kemur upp á 56 stig. Tað sama hendir, um tað kemur í ymisk reinsievni so sum klorin.

Í gjár kunngjørdu myndugleikarnir í Russlandi, at fýra fólk eru sett í sóttarhald, tí illgruni er um, at tey kunnu hava fingið SARS.

# Ódnarveður kravdi nógv mannalív

**Ein røð av meldurhvirlum herjaðu gjáranáttina amerikansku statirnar Kansas og Missouri.**

ÓDNARVEÐUR
*Árni Joensen*

Myndugleikarnir á amerikansku statunum Kansas og Missouri kunngjørdu í gjár partar av statunum sum vanlukkuøki, eftir at ein røð av meldurhvirlum herjaðu teir báðar statirnar gjáranáttina.

Meldurhvirlurnar vóru upp í 400 metrar í tvørmát, og at kalla alt, sum fyri var, varð oyðilagt. Nógv hús fóru, og talið á deyðum kom um middagsleitið í gjár upp í 28.

Guvernørurin í Missouri, Bob Holden, sigur, at oyðileggingarnar av meldurhvirlunum eru tær ringastu, sum hann nakrantíð hevur sæð. Hann hevur lýst ein part av statinum sum vanlukkuøki, og tað sama hevur starvsbróður hansara í Kansas, Kathleen Sebelius, gjørt.

Eldri fólk í Kansas siga, at meldurhvirlurnar eru tær harðastu, sum hava rakt statin seinastu 50 árini.

# Eingin tekur Bush

**Meingingakanningar vísa, at eingin demokratur hevði megnað at koyrt George W. Bush út úr Hvítu Húsunum, var forsetaval nú.**

USA
*Árni Joensen*

*Bush forseti tykist sita tryggur í Hvítu Húsunum*



Higartil hava ikki færri enn níggju limir í demokratiska flokkinum í USA boðað frá, at teir eru til reiðar at stilla upp ímóti George W. Bush, forseta, tá forsetaval verður aftur næsta ár.

Men sambært meiningakanningunum skal nógv til, áðrenn nakar kann skala Bush.

Eygleiðarar halda, at demokratarnir fara at stilla fyrrverandi varaforsetaevnið Joseph Lieberman, senatorin John Kelly ella umboðsmannatinglimin Dick Gephartd upp ímóti Bush. Men ein kanning, sum Washington Post og sjónvarpið ABC hava gjørt, vísir, at eingin teirra hevur nakran møguleika ímóti forsetanum.

Bara 40 prosent av teimum spurdu veljarunum siga, at tey høvdu atkvøtt fyri einum demokrati, var forsetaval nú. Hinvegin siga 53 prosent, at tey høvdu atkvøtt fyri Bush.

## Mitzna fór frá

Formaðurin í ísraelska arbeiðaraflokkinum, Amram Mitzna, segði sunnudagin formansstarvið frá sær.

Á tjóðartingsvalinum var arbeiðaraflokkurin fyri einum eyðmíkjandi ósigri, men tað er kortini ikki ósigurin, sum hevur fingið formannin til at fara frá. Mitzna sigur sjálvur, hann hevur tikið avgerðina, tí hann hevur verið fyri áhaldandi atfinningum frá nøkrum av sínum egnu floksfeløgum. Politiskir eygleiðarar hava hug at geva formanninum alla skyldina. Teir siga, at hann hevur megnað at seta teir flestu tinglimirnar hjá flokkinum upp ímóti sær, síðani hann gjørdist formaður fyri einum hálvum ári síðani.

Avgerðin hjá Amram Mitzna fær onga ávirkan á friðartilgongdina í Miðeystri, tí arbeiðaraflokkurin er í andstøðu, og veljararnir tykjast heldur ikki hava størri áhuga fyri flokkinum nú enn á tjóðartingsvalinum síðst í januar.

## Hevði samband við Saddam

Ein av iraksku andstøðuleiðarunum, Ahmed Chalabi, sigur seg hava haldgóð prógv fyri, at tætt samband var ímillum tann frákoyrda Saddam Hussein og jordanska kongin, Abdullah.

Chalabi sigur, at hann og menn hansara hava lagt hald á 25 tons av skjølum hjá fyrrverandi iraksku fregnartænastuni, og har sigur hann seg hava sæð skjøl, sum prógva sambandið millum frákoyrda einaræðisharran og jordanska kongin. Chalabi sigur, at Abdullah, sum hevur verið kongur síðani 1999, hevur góðar grundir til at stúra fyri, hvat kann henda, verður innihaldið almannakunngjørt.

Tað eru tó minni enn so øll, sum hava álit á, at Chalabi sigur satt. Víst verður á, at irakski andstøðumaðurin búði í Jordan eitt tíðarskeið, har hann varð dømduir 20 ára fongsul fyri umfatandi fíggjarsvik. Tað eydnaðist honum kortini at sleppa til rýmingar, áðrenn dómurin fall.

## Rættarmál skal útsetast

Formaðurin í italska tjóðartinginum hevur nú biðið dómsvaldið útseta eitt rættarmál ímóti landsins forsætisráðharra, Silvio Berlusconi. Formaðurin heldur, at málið eigur ikki at koma fyri rættin, fyrr enn Berlusconi er farin frá.

Eftir ætlanini skal málið koma fyri í rættinum í Milano í dag, og ákæruvaldið vil hava forsætisráðharran dømdan fyri at hava roynt at mutra fleiri dómarar, tá hann vildi hava ræðið á einari stórari handilsfyritøku í 1985.

Marcello Pera, tjóðartingsformaður, heldur, at rættarmálið er sera óheppið, tí tað kann skaða umdømi forsætisráðharrans, eins og tað eisini kann skaða landsins umdømi í altjóða samfelagnum. Tí vil hann hava málið útsett, til Berlusconi er farin úr forsætisráðharraembætinum.

## Kanna dráp

Bretska herleiðslan hevur gjørt av at kanna, hvat hendi, tá ein bretskur hermaður skjeyt ein irakskan drong í býnum Basra har suðuri í Irak.

Tann 14 ára gamli Ali Salim doyði, tá ein bretskur hermaður, sum stóð tætt hjá dronginum, skjeyt hann. Hetta hendi sunnudagin, og herleiðslan hevur váttað, at tann serliga hernaðarløgreglan kannar málið.

Tað er framvegis ikki heilt greitt, hvat hendi, og hví hermaðurin skjeyt drongin. Læknin, sum kannaði líkið, segði við NNC í gjár, at drongurin var raktur í búkin.